# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Nakrar reglur nú ið Anfinn Djurhuus er farin um sýn

Minnir um farnar dagar troka á hendan ólavsøkumorgun í slavtokuni. Var alt sum vanligt, sat tú sum so mangan nú í Torvu og fleygaði í morgun. Men so skuldi ikki vera.

Á veg niðan og hugsaði um farnardagar, barna- og ungdómsdagarnar heima í Kunoy, mjørkin lá so tjúkkur yvir landið, vit bíðaðu eftir at hann fór at lætta, so vit kundu koma á flog. Ikki slapst á flog fyrr enn dagin eftir, ei heldur náddi eg heim at fylgja tær til títt seinasta hvíldarstað her.

Langt var tað frá tær, at trívast í gráum mjørka ella tokutalu, frá barni av visti tú, hvat tað var at møta mótgongd í lívinum. Faðirloysingur gjørdist tú longu sum smápiltur, minnist ikki neyvt hvussu ungur tú tá vart. Mátti tí sjálvur klára teg sum frægast, hóast heim títt í Uppistovu hjá Egga og Ellufíu var frístaður tín í barnaárunum og eisini seinri, tá Malan og Atli tóku yvir.

Vit ið yngri vóru og kendu, at tað var »ábyrgd« hjá okkara eldru brøðrum at uppdraga okkum í óvitan um lívið, minnast, tá Egga og Guttorm vóru burtur, hvussu tú mátti klára teg sjálvan í frælsisbardaga tínum fyri egnar sannføringar millum slagsbrøður, ið royndu eftir bestu »kristnu« fatan síni at buka teg av, tá hildið varð, at tú vart í so frælsur og gekst ov vítt í tíni fatan av, hvussu lívið var skrúvað saman, serliga tá tað galt tað mótsatta kynið og hetta at drekka, snúsa og roykja v.m.

Heldur ikki gloyma vit tá tú »mátti« skaffa tær skotvápn (eina luftbyrsu) at verja teg við. Hetta var um tað mundi, tá Korea kríggið endaði. Hóast tú latst ávaringarskot av hjálpti tað ikki. »Fíggindin« legði á teg kortini, tú mátti skjóta við skørpum, sigti var sjálvandi fyrst í afturpartarnar, og minnast vit enn hvinini, tó ikki frá luftvápninum, men frá teim flýggjandi, meðan teir tóku seg aftur. Og fingu teir greitt at vita, at komu teir aftur, varð siktað hægri. Tá hjálpti, og vápnahvíld kom í lag. Soleiðis endaðu tínir barnadagar.

Altíð vart tú í parti við tí minni menta. Gloymi ikki brúdleypið hjá Karlu og Elian, eftir at hava fingið væl upp í høvdið, var tað mín túrur at blíva avbukaður, tí eg, sum unglingi hevði gjørt onkra skálkagerð móti gamla vinsæla Larsen, nú var løtan komin til uppgerðina. Um Kristian ikki tá legði upp í, yvist eg enn tann dag í dag, um eg hevði verið førur fyri at skriva hesar reglur. Men tú bakkaði, tá hann blunkandi á sínum eyðkenda viðareiðis máli mælti: »Hettar skal ikki verða nakar bardaga dagur, nú einkardótturin heldur brúdleyp«. Og harvið bleiv tað.

Men aftirlønina fekst tú, tó ikki sum tú vildi, lítið visti tú, at eg gangi við lívlangum sárka, ikki bert fyri tað skálkabragdið, men fyri so mangt annað mistak gjørt í barna- og ungdómsárunum. Um lívsleið okkara hevur verið ymisk, hittust vit mangan í Kunoy, serliga í fleygatíðini. Aldrin tók eg sessin frá tær í Torvu, hann var tín, um tú ætlaði tær í bjørgini, hvat so aðrir annars meintu. Altíð royndi eg at vinna tín vinskap, tí eg hávirdi teg fyri, hvussu tú tókst inn at tær tað órættvísi, ið gjørt varð móti tí minni menta, ið ikki kundi verja seg. Har vart tú hóast lítil av vøkstri ein kappi. Ja, sum tú sjálvur mangan tókst til »Ere vi små, så ere vi raske«. Jú, tað livdi tú upp til.

Til seinast ein hending, ið fór fram á ólavsøku fyri mongum árum síðani. Hon lýsir so væl tína fatan, um eg skilti teg rætt, av kristindóminum í landi okkara, sum tú eisini lærdi meg at seta stórt spurnartekin við, ikki stórt frægari enn støðan var, tá Mortan Lutter livdi og munkarnir gingu og seldu syndafyrigeving.

Meðan tann »vápnaleysi« herurin sang á vaglinum, gekk ein smílandi kvinna ímillum okkum, meira og minni appelsinfríðu og royndi at fáa nøkur oyru frá okkum. Tystur sum tú óiva var, tókst tú kollin av tínum eyðkenda purluta krúdli, fór runt við honum, fekk eisini nøkur oyru í hann, ivaleyst til eina øl.

Ímillum tað annars drukna fólkið, var tað ein »edrúur« ið vildi vita, hvar peningurin fór, ið innsamlaður bleiv og hugsaði ivaleyst, um eg lati nøkur oyru sleppi eg ivaleyst snikkaleyst gjøgnum skerseldin. Tessvegna spurdi hann, hvønn tú samlaði inn til. »Jú« varð tú skjótur at svara »til tarvafelagið í Kunoy«. Tá komu ikki fleiri oyru í á tí sinni.

Hvíl í friði, vinurin, vit hittast aftur hjá Honum, ið kennir hjartalag hins einstaka og skoðar neyvt, hvat har er at finna, Hann tekur ikki feil, verjin hjá tí faðirleysa og einkjuni.

**Immi Dam**

## Føroyar mítt land

**»Føroyar, mítt land« sunnudagin 10. august kl. 13:**

Henda vikan í sendirøðini »Føroyar, mítt land« á Rás 2 byrjaði við áhugaverdari umrøðu av mytuni um írskar munkar í Føroyum í forðum. Síðani vórðu tiknar fram minnismyndir úr Seglhúsinum í Klaksvík, vit vóru á sílaveiði við Kirkjuvatn omanfyri Famjin, vóru á kalvaveiði við porkeningum, og vikan endaði við hugleiðingum um tað føroyska fyribrigdið berjasunnudag.

Arne Thorsteinsson, Jógvan við Keldu, Martin Restorff Jacobsen, Janus Mohr og Helena Samuelsen løgdu »Føroyar, mítt land« sendingarnar til rættis hesa vikuna.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

Mánadagin 11. august: Freydis Poulsen
Týsdagin 12. august: Eirikur Lindenskov
Mikudagin 13. august: Heri Tróndheim
Hósdagin 14. august: Turið Sigurðardóttir
Fríggjadagin 15. august: Janus Mohr

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23, (týsdag tó 22.30).

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Ellen Maria Berg Jacobsen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri alla hjálp í sambandi við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar og fyri peningagávur til barnalegurnar í Íslandi.
Stóra tøkk til tykkum mongu, sum settu tíð av, at fylgja Mariu til hennara seinasta hvíldarstað her á foldum.

**Dávur, Elma, Oðny, Sunnuvá og Malan við familjum**

### Føðingar

18. juni fingu Durita Joensen og Rotem Avni, Århus, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

11. juli fingu Gunnvá og Miki Drachmann Poulsen, Amager, ein son. Hann var 53 cm langur og vigadi 3700 gr.

24. juli fingu Ansa Stacey Højgaard, og Fróði J. Lamhauge, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2625 gr.

27. juli fingu Phitchaya Ketphet og Finnbjørn Poulsen, Lopra, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3980 gr.

28. juli fingu Bjørg Schiller Jacobsen, Tórshavn og Jóannis Petersen, Signabøur, eina dóttur og Eva eina lítlasystur, sum var 51 cm. long og vigaði 3310 gr.

31. juli fingu Rita Samuelsen og Jakku Hansen, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 4660 gr.

31. juli fingu Herbjørg H. Jøkladal og Ludvík við Stein, Glyvrar, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3700 gr.

1. august fingu Gurli Eysturtún Jensen, Tórshavn og Peter Christian Stenland, Chicago, USA, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3495 gr.

1. august fingu Anni Debess og Johan V. Bech, Vágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

1. august fingu Eyðna Hammer og Jann Thomsen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4200 gr.

5. august fingu Magna S. Juul og Hjalti Lundsbjerg, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

5. august fingu Camilla Bauman og Mike Larsen, Hvidovre, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4375 gr.

6. aug. fingu Randi Anthoniussen og Eyðun Mortensen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3520 gr.

### 85 ár

Sunnudagin 10. aug. verður Sigurd Danielsen, Sandur, 85 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl 17. Øll eru vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Mánadagin 11. august fyllir Anna Jacobina Ellingsgaard (Annebin) á Eiði 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 10. august í miðhøllini í Eiðis skúla frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 9. august fyllir Aslaug av Rana 80 ár. Hon bjóðar vælkomin í føðingardag heima í Trongisvági frá kl. 11.

### Brúdleyp

Í dag, 8. aug. kl 17 giftast í Havnar kirkju Elisabeth Restorff Hansen, Tórshavn, og Martin Nipgaard Hansen, Munkebo.

Í dag, 8. august giftast Skarpheðinn Njálsson og Johanna Lindenskov Joensen. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 12.00. Opið hús verður í Sløttulíð 12, kl. 14.00, har tey, ið vilja heilsa uppá brúðarparið eru hjartaliga vælkomin.



Í dag, 8.8.08 giftast Arnleyg í Lon Miðvágur og Rógvi Mohr Fuglafjørður. Vígslan verður í Siloa í Fuglafirði kl 15. Um veðrið er til vildar, verður vígslan úti, í Bugnum í Fuglafirði. Drekkamuður verður aftaná vígsluna í Siloa og øll eru vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Siloa kl 19.



Í dag, 8. august kl. 16 giftast í Ólavskirkjuni í Kirkjubø, Tórgunn Kvilt Olsen og Jørgen Meitilberg Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.



Í dag, 8. august giftast Rakul Petersen úr Hvalba, og Jóan Petur á Stongunum úr Tórshavn. Víglsan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.



Í dag, 8/8-08 kl. 13 giftast Anita Arge, Argir og Jens Kartin Rasmussen, Fuglafirði. Vígslan verður í Nebo á Toftum. Øll er hjartaliga vælkomin til ein drekkamunn í missiónshúsinum í Æðuvík frá kl. 14 - 16.